# Rættiliga nógv byggivirksemi

**Á snikkaravirkinum Buli á Signabø hava teir úr at gera. So nógv sethús skulu teir smíða í ár, at teir noyðast at biða fólk innrætta fyri seg**

HÚSASMÍÐ
*Edvard Joensen*



*Tað er so mikið nógv at gera á sniðhúsavirkinum á Signabø, at teir noyðast at biða fólk uttan eftir um at innrætta húsini, teir seta upp*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Byggivirksemið í landinum er sera stórt í løtuni. Sniðhúsavirkið Bulur á Signabø hevur 13 hús niðurfyri at gera í ár, umframt at eisini er biðið um tilboð upp á hús til komandi ár.

Jákup Suni Joensen, stjóri á Buli, sigur, at umframt at smíða hús kring alt landið í hesum árinum, eru longu fyrispurningar komnir um at smíða hús í Hoyvíkshaganum.

Byggingin í Hoyvíkshaganum verður ikki fyrr enn komandi ár, og eru tað feløg, sum selja lidnar loysnir, sum hava biðið um hús frá Buli.

Jákup Suni Joensen heldur, at tað er heldur sjáldsamt við hesi støðuni, at so nógv er umbiðið so tíðliga á árinum.

Teir eru níggu mans, sum arbeiða hjá Buli, og teir hava sett hús upp um alt landið at kalla. Á Sandi og í Klaksvík hava teir verið. Okkurt hús skal vestur í Vágar, eins og fyrispurningar eisini eru aðrastaðni úr Norðoyum enn úr Klaksvík.

– Tað er næstan soleiðsi, at ein verður noyddur at skilja frá, sigur Jákup Suni Joensen. Tað er so galið, at vanligt viðlíkahald líkasum tykist koma í aðru røð, sum gongdin er í dag.

Hann sigur, at fólk tykjast ganga alt meira yvir til at fáa sær eittplanshús.

Tað hevur ymsar grundir, heldur Jákup Suni Joensen. Lutvíst eru tey bílig og rímiliga løtt at fíggja, og eisini eru tey lættari at halda.

Byggivirkið Bulur á Signabø ger lyklaklár hús, greiðir Jákup Suni Joensen frá. Men í løtuni er trýstið so stórt, at teir klára ikki annað enn at gera tey liðug á virkinum og seta tey upp.

Alla innrætting noyðast teir at keypa uttaneftir, sigur hann. Timburmenn, elektrikarar og sjálvt málarar hava teir avtalur við, greiðir hann frá.

Fyrr var tað mangan so, at fólk royndu sjálv at gera sum mest, tá bygt varð. Serliga málararbeiðið var slíkt, sum fólk vanliga gjørdu. Men í dag tykjast fólk hugsa øðrvísi, sigur Jákup Suni Joensen.

– Bæði maður og kona arbeiða og halda seg ikki hava tíð til slíkt. Tey satsa upp á inntøkuna og biða so fólk byggja fyri seg, sigur hann.

Bulur hevur fastar avtalur við handverkarar, sum gera húsini liðug. Talan er bara um føroyingar, sigur Jákup Suni Joensen.

Tað, sum virkið ger sjálvt, eru sjálv elementini, sum verða gjørd inni á vikrinum á Signabø. Síðan verður farið á grundina at seta húsini upp. Tað tekur vanliga ein dag at inniloka eisini sniðhús.

Síðan er tað, at hinir handverkararnir koma inn í myndina, greiðir jákup Suni Joensen frá.

Kostnaðurin fyri innrætting og liðugtgerð verður vanliga avroknaður millum eigaran og tann , sum ger tað arbeiðið, hóast tað í grundini eisini er virkið, sum setir teir í starv, greiðir stjórin á Buli frá.

# Lýsa av nýggjum

**Kirkjuráðini í Norðurstreymoy hava gjørt av at lýsa prestastarvið í Hvalvík leyst av nýggjum**

KIRKJUMÁL

Lýst verður av nýggjum eftir presti til Hvalvíkar. Ov fáar umsóknir komu inn, tá lýst varð fyrru ferð.

Hans Jacob Joensen, biskupur, sigur, at kirkjuráðini í Norðurstreymoy eru vorðin samd um onga innstilling at gera til prestastarvið í Norðurstreymoy.

Tað komu tvær umsóknir, tá starvið varð lýst leyst. Ein føroysk og ein útlendsk.

Við aðrari umsókníni vóru onkur fyrvarni, og varð tí hildið frægast at royna at fáa fleiri umsóknir, og tí er gjørt av at lýsa av nýggjum, sigur biskupur.

Eisini í Suðurstreymoyar eystara prestagjaldi hevur verið lýst eftir presti. Talan er um eitt hjálparprestastarv, sum skal setast fyri í minsta lagi eitt ár. Hetta er fulltíðarstarv.

Presturin, sum var í hjálparprestastarvinum, undan tí, sum nú skal setast, var starvsettur hálva tíð.

Tað kom ein umsókn til hetta starvið, sigur biskupur, og kirkjuráðini hava gjørt av at instilla viðkomandi, sum væntandi verður settur í starvið.

**ej**



*Kirkjuráðini í Norðurstreymoy hava gjørt av at lýsa prestastarvið í Hvalvík leyst av nýggjum*

*Mynd: Edvard Joensen*



Karsten Hansen:

# Avgjøldini fara ongan veg

**Í spurninginum um avgjøldini á rúsdrekka liggur bólturin hjá Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharra. Men fólk skulu ikki byrja at gleða seg ov tíðliga, tí Karsten hevur ongar ætlanir um at leggja málið fyri tingið sum nú er. Karsten Hansen metir ikki leiklutin hjá Bjarna Djurholm í hesum málinum vera hóskandi**

RÚSDREKKA
*Heri á Rógvi*



*– Eg valdi ikki at gera nakað við málið, men eg kundi sjálvandi farið í fjølmiðlarnar við hesum. Tað er ein spurningur, um hetta kanska er brot á stýrisskipanarlógina, sigur Karsten Hansen*

Avgjøld – eisini tey á rúsdrekka – hoyra undir fíggjarmálastýrið. Ovastin á fíggjarmálastýrinum er Karsten Hansen, landsstýrismaður. Fyrrverandi løgregluovastin í Klaksvík hevur fingið eitt tilmæli úr Vinnumálastýrinum, undirskrivað av Bjarna Djurholm, landsstýrismanni.

Bjarni greiddi í síðstu viku Sosialinum frá, at talan var um vanliga mannagongdin í einum tílíkum máli, sum lá til tvey stýri, tá ið hann umsitur rúsdrekkamál, og Karsten Hansen umsitur fíggjarmál.

Bjarni Djurholm segði í sama viðfangi, at málið nú hevði ligið hjá Karsten Hansen og fíggjarmálastýrinum 3/4 ár, og hann hevði eisini roynt at skunda undir málið.

Útleggingin hjá Karsten Hansen um hetta sama málið er tó ikkí heilt eins. Karsten kennir tað als ikki sum nakað samstarv millum Vinnumálastýrið og hansara egna stýrið, Fíggjarmálastýrið. Tað var á landsstýrisfundi í fjør, at Karsten Hansen fyrstu ferð frætti um ætlaðu broytingarnar.

– Á landsstýrisfundi 13. juni 2001 boðaði Bjarni Djurholm frá um ætlaðu broytingarnar á avgjøldunum á rúsdrekka. Hetta kom óvart á meg, og eg boðaði eisini løgmanni frá hesum, sum eisini gav Bjarna boð um, at málið hoyrdi undir mítt málsøki, og málið skuldi ikki fyri landsstýrið, sigur Karsten Hansen.

Landsstýrismaðurin við fíggjarmálum kennir støðuna hjá starvsfelagnum í Vinnumálastýrinum í hesum málinum vera óhóskandi.

Á áðurnevnda landsstýrisfundi varð eisini tann prinsipielli spurningurin um hvør leikluturin hjá landsstýrismonnum skal vera í tílíkum málum, har ivi er um málsøki ella málið nertir tvey stýri. Niðurstøðan var, at landsstýrismenn skulu kunna avvarðandi landsstýrismann, áðrenn farið verður yvir um mark.

– Eg valdi ikki at gera nakað við málið, men eg kundi sjálvandi farið í fjølmiðlarnar við hesum. Tað er ein spurningur, um hetta kanska er brot á stýrisskipanarlógina, sigur Karsten Hansen.

– Eg havi so ongantíð gjørt nakað tilmæli í einum málsøki hjá Bjarna Djurholm, staðfestir Karsten Hansen.

### Kenna støðuna

Hóast Karsten Hansen hevur fingið eitt tilmæli, so hevur hann ongar ætlanir um at fara víðari við málinum – í øllum førum enn.

– Eg fari ongan veg víðari við málinum sum støðan er. Eg skal fyrst hava vissu fyri, at hetta ikki fer at økja um nýtsluna, áðrenn eg geri nakað við málið, men hetta verður ikki í næstum, sigur Karsten Hansen.

Tá tað ikki er leingi til næsta løgtingsval, er tað ein spurningur, um Karsten Hansen fer at gera nakað við rúsdrekkaavgjøldini.

– Eg seti nakrar heilt greiðar fortreytir, um eg skal gera nakað við málið. Vit skulu kanna eftir, hvat er hent aðrastaðni, og tað er týdningarmikið, at nýtslan ikki veksur, sigur Karsten Hansen, sum ikki ætlar sær at leggja nakað uppskot fyri tingið, fyrr enn hann fær hetta uppfylt.

Karsten Hansen hevur starvast sum løgreglumaður, og hann sigur seg kenna málið hiðaniífrá eisini.

– Er tað knapliga vorðið fínari at drekka vín enn øl. Tá víst verður á, at gongdin rættar seg sjálvan, hví eiga vit so at gera nakað, spyr Karsten Hansen.

Einar Waag, Føroya Bjór:

# Vínið verður tikið framum

**Argumentini hjá myngugleikunum eru púrasta burturvið. Vínið verður tikið framum í almennu rúsdrekkasøluni, sigur Einar Waag**

RÚSDREKKA
*Heri á Rógvi*



*– Sjálvandi er avgjaldið í Føroyum alt ov høgt, men vín og øl skulu viðgerast líka ,og vín skal ikki favoriserast, sigur Einar Waag at enda, sigur Einar Waag*

Tað var í Sosialinum mikudagin í farna viku, at Einar Waag greiddi frá, hvat hann helt um ætlaðu broytingarnar á avgjaldinum á rúsdrekka í Føroyum.

– Ætlaðu broytingarnar í avgjaldinum á rúsdrekka taka ein stóran av grundarlagnum undan føroyska ølinum, segði Einar Waag m.a.

Hansara sjónarmið vórðu afturvíst av bæði Bjarna Djurholm, landsstýrismanni, og Dagmar S. Joensen, stjóra fyri Rúsdrekkasølu landsins. Tey meintu, at Einar Waag ikki hevði skilt støðuna heilt rætt.

– Tað er møguliga rætt, tá sagt verður, at eg kanska ikki heilt skilji mannagongdina, men fakta er at Landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur lagt eitt fullfíggjað lógaruppskot fyri Landsstýrið, uttan at hava havt nakað samband við vinnuna hetta lógaruppskot rakar.

Einar Waag letur tó aftur frætta frá sær.

– Eg berjist fyri mínari fyritøku, og hetta stigið er ikki gott fyri nakað av føroysku bryggjaríunum, sigur Einar Waag.

Tà vit spyrja Einar eftir, um hetta ikki bert er lobbyisma frá hansara síðu, svarar hann, at hann sjálvandi roynir at arbeiða fyri áhugamálini hjá sínari fyritøku.

– Rúskdrekkasøla landsins hevur gjørt eitt gott arbeiði fyri at fremja vínsøluna í Føroyum. Starvsfólkið er væl skúlað og tey hava duga at skapt áhuga fyri víni í Føroyum, og harvið eisini fingið víni fram millum manna í Føroyum, har tað kanska ikki var stórur áhugi áður, sigur Einar Waag.

Einar vísir á, at stjórin fyri Rúsuna hevur borið upp á mál, at tað bert eru tey etableraðu, sum drekka vín, og at øl og vín ikki kappast, tá hetta er hvør sín drykkur til hvørt sítt høvi. Hesum er Einar Waag tó als ikki samdur í. Hann metir so avgjørt ikki, at teirra ølsøla verður tann sama, um ætlaðu broytingarnar verða veruleiki. Hann er avgjørdur í tí sjónarmiði, at víni fer at eta av ølmarknaðinum.

– Um tað er soleiðis, at tað bert eru tey etableraðu, ið drekka vín, so kunnu tey eisini sleppa at gjalda fyri tað. Merkir hetta, at fólk bert drekka øl fyri at gerast full? Føroyingar hava altíð drukkið øl, og tað er ein partur av mentanini at drekka øl aftur við matinum – serliga føroyskum mati. Tað er eisini beinleiðis skeivt at siga, at øl og vín ikki verða nýtt til sama høvi, sigur Einar Waag.

Er tað nøkur orsøk til at framskunda eina gongd, sum møguliga kemur av ráki úr Danmark? Er nøkur orsøk til at lóggeva til frama fyri vín, tá tað kemur at ganga útyvir eina føroyska vinnu, spyr Einar Waag.

Stjórin á Føroya Bjór fær seg ikki til at skilja hugburðin hjá myndugleikunum, sum framseta teirra gulløl sum sterkt øl. Hann metir ikki, at talan er um nakran týðandi mun, og tí gevur tað í hansara verð ikki nakra meining ikki at minka um avgjaldið á gullølinum eisini, tá víni og pilsnaraøli verður bíligari at keypa.

– Einkarsølan hevur alla tíðina roynt at fremja vínsøluna í Føroyum, nú tá tað sær út til at eydnast, skula tey eisini gera víni bíligari, sigur Einar Waag.

Stjórin fyri størsta bryggjaríið í landinum heldur tað vera løgið, at myndugleikararnir samanbera soleiðis uttan víðari við eitt nú gongdina í Danmark, har tey donsku bryggjaríini hava mist nógva sølu. Samstundis fílist hann á, at ólógligt rúsdrekka verður nevnt sum ein avgerandi faktorur.

– Ein harmonisering skal fara fram í ES yvir nøkur ár fyri at darva smugling. Føroyar eru ikki í ES, eru ikki landfast við annað land og hava eina løgreglu og tollvald, sum sær alt. Ì Danmark kappast bryggjaríini við nógvu keypini hjá dønum í Týsklandi og øðrum londum, har øl kann fáast bíliga til vega, sigur Einar Waag.

Sum heild kennir Einar Waag, at myndugleikarnir ikki hava neyðugt fyrilit fyri føroysku bryggjaríunum.

Annars heldur Einar at hetta kjak kann halda uppat nú, og takast uppaftur aftaná valið í apríl, tí tað er ikki líkt til at nakað fer at henda í hesum málið nú.

– Sjálvandi er avgjaldið í Føroyum alt ov høgt, men vín og øl skulu viðgerast líka, og vín skal ikki favoriserast, sigur Einar Waag at enda.